TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Skrivari

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir skrivara til byggi- og býarskipanardeildina at byrja skjótast til ber.

Byggi- og býarskipanardeildin er deild undir teknisku fyrisitingini og hevur m.a. planlegging, byggimál, lendisviðurskifti og kommunalar ognir um hendi.

**Arbeiðsuppgávur**
Starvið er fjølbroytt, og verða uppgávurnar í høvuðsheitinum hesar:
- skrivari hjá býararkitektinum
- skriva fundarskráir og fundarfrásagnir
- fyrireika tá fundir eru
- taka ímóti og avgreiða boð
- ymiskt skrivstovuarbeiði

**Førleikakrøv**
Umsøkjarin skal hava relevanta skrivstovu-útbúgving, umframt at:
- hava royndir innan skrivstovuarbeiði
- hava góðan kunnleika til EDV
- duga væl føroyskt og danskt, bæði í skrivt og talu, umframt at hava kunnleika til enskt

**Eginleikar**
Tað er umráðandi, at umsøkjarin kann arbeiða sjálvstøðugt, dugir væl at leggja arbeiðið til rættis, er fyrikomandi og dugir væl at samskifta, bæði innan- og uttanhýsis.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmálanum millum Starvsmannafelagið og kommunala arbeiðsgevarafelagið, við løn í 3. flokki.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Marius Müller, tekniska stjóra, ella Janus Isfeldt, lønarfulltrúa á 315160.

**Umsóknir**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skulu vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin 22. apríl 2002. Viðmerk á brævbjálvan "skrivari".

SNARSKIVAN

## Lastbilførara

Sóknast verður eftir lastbilførara við tí stóra koyrikortinum.

Áhugaði kunnu venda sær til P/F Poul Michelsen tlf. 314650.

**P/F Poul Michelsen**

Lesið Sosialurin -tað loysir seg

Gøtu Kommuna

## Gøtu kommuna søkir

1 Dagrøktara, at byrja skjótast tilber.
1 Sjúkraavloysara fyri dagrøktararnar, at byrja skjótast tilber.

Dagrøktarheimið skal vera innrætta barnavinarligt, har rúm er til børnini at spæla í og hóskandi trygt spæliøkið uttanfyri.

Í skipanini er bert ein dagrøktari í løtuni. Ætlanin er at skipa fyri einum tiltakið, har dagrøktarar saman við børnunum, sjúkraavloysarar og leiðaranum koma saman til ymisk, ein dag um vikuna frá kl. 7.30 til kl. 12.30. Vit verða í stovuni, sum frítíðarskúlin brúkar.

Lønin er sambært sáttmála við Føroya Kommunala arbeiðsgevarafelag.

## Til Dagstovnin

Søkist ein avloysari fyri pedagog í barnsburðarfarloyvið, at byrja 6. mai 2002 til 23. desembur 2002.

Arbeiðið er í vøggustovu 20 tímar um vikuna.

Vøggustovan er normerða til 14 pláss, frá 0-2 ár, 80 pedagogtímar um vikuna og 60 hjálparfólkatímar um vikuna.

Um eingin pedagogur søkir verður hjálparfólk sett.

Lønin er sambært sáttmála við Føroya Pedagogfelag.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Torgerð Hansen, tlf. 442012 lokal 10.

Skrivlig umsókn við avritum av prógvum, tilmælum v.m. skal sendast okkum áðrenn 18. apríl 2002. Bygdarráðið tekur sær rætt til frítt at velja millum umsóknirnar ellan ongan at seta.

**Dagstovnurin í Gøtu**
Boks 32
511 Gøtugjógv

## Ársaðalfundur

Ársaðalfundur verður á loftinum í ÍSF-húsinum hóskvøldið 11. apríl kl. 19.00.

12 MAÐUR

## Ársaðalfundur

Aðalfundur Tvøroyrar Handverkarafelags, verður í húsum felagsins leygardagin 20. apríl 2002, kl. 19.00.

Skrá: Sambært §24 í lóg felagsins.

**Nevndin**

Fiskimálastýrið

## Móttøka

Í samband við, at leiðslan á MRCC-Tórshavn frá 1. apríl 2002 er flutt frá Færøernes Kommando til Fiskimálastýrið, verður skipað fyri móttøku á nýggju ***Sjóbjargingarstøðini, MRCC-Tórshavn, Tinghúsvegur 64.***

**fríggjadagin, 5. apríl 2002 kl. 10 – 12**

## Norðoya Javnaðarfelag

Eykauppstillingarfundur til løgtingsvalið verður í Bøgøtu 3, hóskvøldið 4. apríl, kl. 20.00.

**Nevndin**

## Bilur við skaða til sølu

**Merki:** HONDA Accord ES VTEC – 4 hurðar
**Árg.:** 6/12 – 2001
**Km.:** 4.174
**Eyka útgerð:** Sóltak, tokulyktir, klimaanlegg, leður inntrek, el-rútar, centrallás og annað.

Bilurin verður seldur, sum hann stendur nú, og kann síggjast á bilverkstaðnum hjá Sp/f Oyri v/ Tom Villy Magnussen, FO-900 Vágur.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Magnus E. Joensen, sýnsmaður
Tlf.: 373890 ella 224859
Fax: 373117

at hitta millum kl. 08.00 – 10.00.

## Bilur við skaða til sølu

**Merki:** FORD Escort Van 75 Diesel
**Árg.:** 23/10 – 1998
**Km.:** 51.424

Bilurin verður seldur, sum hann stendur nú, og kann síggjast á bilverkstaðnum hjá Sp/f C. N. Bygg v/ Jón Nielsen, FO-900 Vágur.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Magnus E. Joensen, sýnsmaður
Tlf.: 373890 ella 224859
Fax: 373117

at hitta millum kl. 08.00 – 10.00.



## OLJUTINGIÐ

Petroleum Association of the Faroe Islands

Toftild Alternativt Hår

## NÝTT HÁR!





**HOTEL HAFNIA (Loftið)**
Leygard. 6. apríl og sunnud. 7. apríl
frá kl.14.00 - 19.00

**SJÓMANSHEIMIÐ Í KLAKSVÍK**
Mánad. 9. apríl
kl.12.00 - 18.00

Vinarliga ring og bílegg tíð

*Nú koma vit aftur á vitjan í Føroyum.*
*Við okkum hava vit snotuligasta úrvalið av hárkollum og parúkkum.*
*Vit hava einaumboðan av nýggjari japanskari tægr, sum er einastandandi slitsterk, og tískil serstakliga vælegnað til fólk við kropsliga hørðum arbeiði – til dømis fiskimenn, handverkarar og onnur.*
*Hárluturin hevur ótrúlig evni at halda hársniði, og verður ikki sleipin sum frálíður. Harumframt er hann sera vælegnaður til varandi áseting.*
*Og júst varandi áseting er serøki okkara. Lagdur verður ein tráður undir húðina, og síðan verður hárluturin fastgjørdur. Nú vaskar og greiður tú hárið, sum var tað títt egna. Ein léttur og fittligur máti at endurnýggjað hárið. Sjálvur avger tú alt um lit, snið, bygnað o.s.fr.*
*Legg til merkis:*
*Vit eru fremstu útvegarar og serfrøðingar Danmarkar tá umræður øðrvísi hár, so kom innar og hygg at tilfarinum...*



HENNING TOFTILD
Toftild Alternativt Hår

BUDOLFI PLADS 9 DK-9000 AALBORG
TLF: 98 10 32 11 FAX: 98 13 36 22
www.alternativt-haar.dk

Heimarøktin í Eysturoy

## Summarfrítíðar-avloysarar

**Sjúkrasystrar**
**Heilsurøktarar**
**Heilsuhjálparar**
**Heimahjálparar**

Søkt verður eftir summarfrítíðaravloysarum í skiftandi vaktum í Heimarøktini í tíðarskeiðnum 1. juni – 30. september.

Okkum tørvar avloysarar bæði úti í heimarøktini og inni á eldrasambýlunum, sum eru í økinum.

Nærri fæst at vita við at venda sær til økisskrivstovuna í Runavík tlf. 449249.

Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag.

Skrivslig umsókn við avriti av prógvi verður at senda til:

**Heimarøktin Eysturoy**
Postboks 47
620 Runavík

Lesið Sosialurin -tað loysir seg

## Grundstykki í Klaksvík

Til sølu, um hóskandi boð fæst.

Stykkið er uml. 700 kvm. og liggur við Helnabrekku.

**Tlf. 457441 ella 312425**
*(best millum kl. 17 og 19)*

## Bilur við skaða til sølu

**Merki:** FORD Fiesta Focus 1,3 cc
**Árg.:** 20/6 – 1996
**Km.:** 60.554
**Eyka útgerð:** 3 hurðar

Bilurin verður seldur, sum hann stendur nú, og kann síggjast á bilverkstaðnum hjá P/F Mogens Petersen, FO-826 Trongisvágur.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Magnus E. Joensen, sýnsmaður
Tlf.: 373890 ella 224859
Fax: 373117

at hitta millum kl. 08.00 – 10.00.

demich

Stiðjagøta 2 – Postboks 378
FO-110 Tórshavn
Tlf.: 311071 – fax: 310460
e-mail: demich@demich.fo

## Lærlingur

**Hevur tú hug at royna teg?**

Vegna økjandi virksemið, søkja vit eftir lærlingi til handil okkara, læran kemur at umfata samskifti við viðskiftafólk, útkoyring og bílegging av vørum o.a.

Væntað verður at tú dugir at arbeiða sjálvstøðugt, er fyrikomandi og hevur hug at veita viðskiftafólki okkara eina góða tænastu.

Fyri at koma í læru, er tað ein treyt, at tú hevur koyrikort og FHS ella HH.

Skrivlig umsókn verður at senda til okkum í seinasta lagi 12. apríl 2002.

## Skrivstovuhøli til leigu

Skrivstovuhøli til leigu, uml. 100 m2 til støddar, í húsinum hjá Føroya Postfelag á Tinghúsvegi 15.

Nærri fæst at vita um hølini á tlf. 317231 ella 217231.